LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3, Postsmoga 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 28. januar 2025
J. nr.: 25/01743-2

Svar

upp á

skriftligan fyrispurning nr. 52-074/2024 eftir § 52 a í tingskipanini, um kunngerðina um alment útboð av kommunalari fastogn, frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu

Spurningar:

1. Metir landsstýrismaðurin, at kunngerðin um alment útboð av kommunalari fastogn er nøktandi, til tess at kommunur kunnu skunda undir bústaðarbygging?
2. Um nei, eru ætlanir at broyta kunngerðina til tess at tryggja bústaðarbygging?

Svar til spurning nr. 1 og 2:

Tað er trupult at meta um, hvørt kunngerðin um alment útboð av kommunalari fastogn er nøktandi ella ikki, og tískil um ásetingar í kunngerðini møguliga eiga at verða broyttar (kunngerð nr. 122 frá 2000).

Orsøkin er, at avbjóðingin er samansett. Tørvur er tí á, at land og kommunur seta seg saman, at finna skilagóðar langtíðar loysnir til frama fyri føroyska bústaðarmarknaðin.

Eg eri samdur í, at støðan viðvíkjandi bústaðartroti er ein avbjóðing. Eisini, at tað er tørvur á at finna skilagóðar loysnir, til tess at gongd kann setast á at fáa tryggjað bústaðarbyggingina.

Tað er harmiligt, um góð hugskot, at hjálpa við at loysa bústaðartrotið fara fyri skeytið, um tað er orsakað av, at kunngerðin um alment útboð av kommunalari fastogn, forðar fyri hesum.

Tí fari eg, sum áður boðað frá, í svari til fyrispurning 52-070/2024 til Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinnu, dagfest 15. januar 2025, at taka hetta upp við kommunurnar í næstum, saman við málinum um útstykking og sølu av grundstykkjum hjá kommununum.

Tað er mín vón, at hetta samskiftið, millum landsstýrið og kommunurnar, fer at bera við sær loysnir, ið skunda undir útboðið á bústaðarmarknaðinum.

Fara loysnir, sum landsstýrið og kommunurnar koma fram til, at viðføra, at tørvur er at gera broytingar í kunngerðini um alment útboð av kommunalari fastogn, eri eg sinnaður at hyggja jaligt upp á hetta.

Løgmálaráðið 28. januar 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður